

*Teir fara at strekkja sær búkvøddarnar við einum dartspæli. Løtu seinni vóru boð eftir teimum aftur. Ernst Vágsgarð kastar, meðan havnafútin Jógvan Ziska Dahl fær sær ein bita*



*Teir eru klárir at fara til verka við sethúsini í Klaksvík. Løtu seinni vóru húsini tryggjað*



*Pláturnar eru loysnaðar, og menn kanna, hvussu teir skulu bera seg at, so ikki størri skaði hendir*



*Teir arbeiða við eini húsatekju í Norðdepli, har lektirnar vóru loysnaðar. Hon fekk skaða í fyrra storminum, og var nú farin aftur at leka*

# Friðarlig nátt á brand

**Nýggi leiðarin hjá sløkkiliðnum í Klaksvík, Finn Hansen stóð fyri síni fyrstu stóru uppgávu í nátt. Boðað varð frá ógvusligum vindi úr eini ætt, sum ikki er so góð norðanfyri. Nakað eftir kl. 01 var sløkkilið aftur boðsent**

ÓDNARVEÐUR

*Snorri Brend*
*snori@sosialurin*
*Myndir: Bárður Lydersen*

**Klaksvík:** – Eg var júst liðugur við at skimma Norðlýsið ígjøgnum, tá telefonin ringdi.

– Her var bara eitt at gera: Aftur á støðina!

Tá henda telefonin ringir soleiðis í eini ódnarnátt, er tað eitt greitt tekin um, at nú er brúk fyri góðum sløkkiliðskreftum til einhvørja neyðstøðu.

Lítla løtu seinni var hesin maðurin og allir hinir í sløkkiliðnum á støðini, og kundu fara undir enn eina uppgávu farnu nátt.

Boð vóru nevniliga komin norðan úr Norðdepli. Ein presending, sum varð løgd á eini sethús fyrr í vikuni, var við at fara. Varð ikki borið skjótt at, kundi skaði standast av hesum.

Hetta var aðru ferð at teir vóru í Norðdepli í hesum umfarinum. Men annars var talan um eina róliga nátt hjá sløkkiliðnum í Klaksvík.

## Flak og ættir

Boðað varð frá nógvum vindi, og tí hevði sløkkiliðið fyrireikað seg upp á tað, sum henda kundi.

Kl. 21 fingu teir fyrstu boðini: Ein neystatekja í Norðdepli stóð til at fara. Neyðugt var at tryggja hana av nýggjum.

Menn óttaðust fyri, at tekjan skuldi ríva av hesum neystinum. Mett varð, at hon fór ikki at klára eina slíka ódn aftrat.

Tað var nógvur vindur hesa løtuna, og arbeiðið var eitt sindur trupult í teimum hvøssu hvirlunum. Men við skilvísi og royndum gekk hetta eisini eftir ætlan.

Menn savnaðust nú aftur á støðini fyri at tosa um tað sum var hent. Teir høvdu ikki bíðað leingi, fyrrenn ein hvítur flamingokassi var borin inn á støðina.

Onkur merkti beinanvegin angan av steiktum flaki. Rætt var: Í kassanum lá steikt toskaflak við eplum, og tað var ikki frítt, at hetta kom væl við hjá monnum.

Meðan teir soleiðis sita og eta støkkur fólk inn á gólvið fyri líkasum at fregnast um, hvat teir hava tykist við fyrr um kvøldið. Ein teirra er